## 10 til NM

Tvey tey fremstu í hvørjum aldusrbólki í talvkappingini fyri ung vunnu sær pláss í NM-kappingini, sum í februar mánaði verður í Danmark. Tey ella teir tíggju eru: IM Helgi Dam Ziska og Hjalti Toftum Jógvansson úr Tórshavn, Rógvi Egilstoft Nielsen og Høgni Egilstoft Nielsen úr Sandavági, Rógvi Dragaberg, Heðin Gregersen og Einar Gregersen úr Klaksvík, Rúni Vørmadal og Sjúrður Olsen úr Vestmanna, Pætur Poulsen úr Skopun. Einar Gregersen, Sjúrður Olsen og Pætur Poulsen eru nýggir í NM-høpi.



## AaB heilt nær sensatiónini

Jón Rói Jacobsen var í hópinum men kom ikki á vøllin, tá AaB í gjár var heilt nær við at fáa stig í útidystinum móti Tottenham í UEFA-Cup kappingini. Við málum frá Thomas Enevoldsen og Kasper Risgård var AaB nevnliga á odda í steðginum. Nýggi Tottenham-venjarin, Juande Ramos, fekk tó vent skútuni eftir steðgin, og bert eitt korter inn í seinna hálvleik hevði Tottenham skotið seg upp á 3-2, sum gjørdist endaliga úrslitið. Málini hjá Tottenham skutu Berbatov, Malbranque og Darren Bent.

# Sera spennandi FM – finalur!

**Argja skúli var enn einaferð karmur um FM endabrakið í talvi fyri ung, sum varð telvað leygardagin. Í harðari kapping vunnu tíggju ungfólk sær her møguleikan at taka lut í NM-kappingini**

TALV
*tíðindaskriv*

FM-finalurnar 2007 vórðu – sum væntað varð frammanundan - sera spennandi. Borðreitt varð við góðari telving og undirhaldi í serflokki. Umframt at telvað varð um FM-heitið í 5 aldursbólkum, ráddi um í minsta lagi, at røkka 2. plássið í aldursbólkinum, tí harvið varð NM-luttøka í Danmark í februar mánað 2008 – tryggjað. Ein "gularót" sum ár undan ári, ger FM finaluna til nakað heilt serligt.

IM Helgi Dam Ziska gjørdi sína skyldu í U20 bólkinum og vann FM heitið sannførandi. Brøðurnir Rógvi Egilstoft Nielsen og Høgni Egilstoft Nielsen úr Sandavági vunnu FM í ávikavíst U16 og U10 bólkinum, meðan Rúni Vørmadal úr Vestmanna hálaði FM-gullið heim í U14. Neyðugt varð við umdysti um oddasessin í U12 bólkinum, í millum brøðurnar Heðin og Einar Gregersen úr Klaksvík. Uppgerðina vann Heðin Gregersen. Somuleiðis varð neyðugt við umdysti um seinna NM plássið í U10 bólkinum – orrustuna vann Sjúrður Olsen úr Vestmanna ímóti Alfred Olsen, somuleiðis úr Vestmanna.

Nakað óvæntað var tað, at Pætur Poulsen úr Skopun í fyrstu FM royndini í U14, megnaði at vinna silvur, sum harvið tryggjaði honum NM-pláss. Pætur Magnussen úr Tjørnuvík gjørdi honum bragdið eftir, tá hann sensationelt vann FM-bronsu í U12-bólkinum.

Samanlagt vunnu klaksvíkingar flest heiðursmerki. Triðingurin – 5 steyp - fóru norðurum: 1 Gull, 2 Silvur og 2 bronsusteyp. Havnin og Vestmanna vunnu hvør síni 3 steyp og Skopun og Tjørnuvík, hvør sítt. Hinvegin varð Sandavágur ovast við tveimum FM-vinnarum.

### Ongin ivi – IM Helgi Dam Ziska !

Ungi altjóða meistari Føroya, IM Helgi Dam Ziska, lat ongan iva vera um, at FM-heitið varð hansara í elsta bólkinum fyri telvarar 20 ár og yngri. Vann kappingina ósvitaliga trygt við fullum stigatali. Hinvegin gjørdist sera spennandi hvør megnaði at vinna 2. plássi og harvið NM-luttøku. Innanhýsis javnleikur ímillum Jón Gregersen og Rógva Dragaberg tíðliga í kappingini innibar, samstundis sum báðir vunnu á Herborg Hansen, at hesir báðir lógu best fyri. Og avgerðin fall ikki fyrr enn í seinasta talvinum, har Rógvi Dragaberg, hóast fullkomiliga javna støðu ímóti Reidari, vann talvið, meðan Herborg Hansen hegnisliga basti Jón Gregersen, soleiðis at Jón ikki fekk umdyst um 2. plássið. Við sigrinum hálaði Herborg Hansen samstundis bronsuna heim.





*Tað stóð nógv á í fleiri av dystunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Siðvanda NM parið megnaði NM-rundferðina !

U16 bólkurin var mannaður við fleiri av okkara roynd-astu unglingatelvarum og lagt var upp til ein sera spennandi og opnan FM-endabrest. Dagsformurin sýntist at vera bestur hjá Rógva Egilstoft Nielsen, sum telvdi gullið heim, uttan tap, og samanumtikið sannførandi.

Stóri spenningurin undan finaluni í U16 bólkinum var annars, um javnaldrinir Rógvi E. Nielsen og Hjalti T. Jógvansson megnaðu NM-rundferðina. FM-gullið til Rógva og sannførandi 2. pláss til Hjalta, staðfesti, at NM-parið nærum hevur "patent" uppá 91-92 árgangin. 6. árið upp í slag tryggjaðu teir rundferðina, sum byrjaði í Føroyum í 2002: Føroyar, Svøríki, Noreg, Finland, Ísland og – á Argjum 2007 – Danmark 2008. Innanhýsis, stendur nú á jøvnum 3-3 í FM-sigrum.

Bogi Hansen Eliasen var tryggur á 3. plássinum, meðan tveir javnleikir tíðliga í kappingini, merktu, at Margar Berg gjørdist ov stuttur.